## … um ítrótt

Eg fylgi við í ítrótti sum vanlig fólk gera. Sjálvandi havi eg serligan áhuga fyri lokala ítróttinum her í økinum – EB/Streymi, Hvassa og øðrum. Eg fari eisini onkuntíð til landsdyst, og nú er tað so snilt, at tú fært fylgt við einum fótbóltsdysti við einum oyrasnigli, meðan tú slært gras.



## … um politikarar

Politikarar eru hampafólk og vanlig skilafólk, men tað er munur á einum politikara, sum hevur mikrofonina frammanfyri sær, og einum politikara, sum tú møtir á kaffistovuni í løgtinginum. Í kaffirúminum eru teir allarflestu hjartans vinir, men verður mikrofonin tendrað, so kemur eldur í.

# størstu fíggindarnir



*- Hetta økið er eitt gamalt torvpláss hjá fólki á Oyri og Norðskála, so tað skuldi eitt sindur av arbeiði til fyri at fáa jørðina góða at planta í, sigur Edmund Joensen um stóra garðin á Oyrabakka. Mynd: Sunva Lassen*

í holt við tað stóra økið, sum tey áttu rundan um húsini hjá sær. Økið var tað 4.000 fermetrar, og seinni hava tey keypt afturat, so at økið rundan um húsini er 6.000 fermetrar stórt.

– Onkur vildi sagt, at tá ið eg kom upp í, so skuldi tað vera so ógvusligt, sigur Edmund við einum smíli.

### Lívd og dren avgerandi

Fyrsta uppgávan var at drena økið væl, at velta moldini, og so annars at gera klárt til at planta trø.

– Hetta økið er eitt gamalt torvpláss hjá fólki á Oyri og Norðskála, so tað skuldi eitt sindur av arbeiði til fyri at fáa jørðina góða at planta í. Vit hava leitt vatn burtur, velt moldina væl, og tí er gjørligt at fáa trø at vaksa her. Onkrastaðni hava vit eisini koyrt knústar skeljar í moldina, sigur Edmund.

– Vit hava ráðført okkum nógv við Skógrøkt Landsins, tí tey vita væl um trø, og hvat kann klára seg í føroyska veðurlagnum.

Hann gongur undan, meðan vit gera ein túr runt í garðinum, og hann finnir væl røttu leiðirnar millum trøini, yvir um ánna, út um garðin, og so innaftur. Hann veit, hvat trøini kunnu stinga eitt sindur, og hvar tað er best, at klúgva upp um garðin.

– Vit hava plantað rósutrø uttast, tí tey klára eitt sindur av hvørjum og kunnu skapa lívd fyri øðrum trøum innanfyri. Her sunnanfyri hava vit eisini gjørt ein garð fyri tveimum árum síðani, og hann hjálpir eisini væl til at skapa lívd fyri trøunum, greiðir

garðinum, áðrenn eg fekk áhuga fyri tí. Eg var so nógv upptikin av øllum øðrum, eg gav mær ikki stundir til at fara út í havan, sigur Edmund.

Konan, Edfríð, tekur undir við hesum.

– Fyri 20 árum hevði eg ikki trúð, at Edmund skuldi fara at broytast so nógv. Hann hevði so nógv annað at takast við, at hann vísti ikki áhuga fyri trøunum, men har er nógv broytt, sigur Edfríð.

Tá ið Edmund kom upp í leikin, gjørdu hann og konan av at fara

## Fakta

**Navn:** Edmund Joensen
**Føddur:** 19. september 1944
**Kona:** Edfríð Joensen av Norðskála
**Bústaður:** Oyrabakki
Løgtingsmaður síðani 1988
Løgmaður 1994-1998
Fólkatingsmaður 1994-1998
Løgtingsformaður síðani 2002